# Hvør forfylgir hvørjum?

**GERHARD LOGNBERG**
Løgtingsmaður



Eg siti henda Alla halganna morgun, og lesi gomlu Dimmu, meðan Merkið veittrar so vakurt í hálvari stong, og norðanvindurin kínur eftir krossmerkinum, sum minnir okkum um teir sum fórust á havinum.

Eisini er hetta føðidagur mín, og er tað ikki sørt, at tankarnir spola aftureftir, um tíðina her í grannalagnum sum óviti, og sorgleysur fór strúkandi at durinum hjá næstringum, klæddur í tí frægasta ein átti. Sjáldan fór man tómhentur frá durunum, 50 oyru her, 1 krónu der. Ja, tað tað slóð ikki falska mentu hjá einum óvita, og vórðu oyruni sloppin niður í tað tóma Molly blikkið, sum hol var koyrt á, so tað kundi nýtast sum sparibússa.

Men gott er, tann tíðin er farin og man hevur brúk fyri tjúkkari húð!

Í Dimmu er tað ikki hissini, sum journalisturin Kári Mikkelsen klárar í eini knappari vending. At sverta henda óhoyriliga Sandoyar tingmannin til við hálvum og heilum lygnum, kryddað við eitt sindur av slatri.

Men ikki skal eg illneitast inn á hann, tí journalistarnir eru nógvir og ein vælbryggja søga slær ikki falska mentu.

Men tað var ikki tað eg skuldi nerta við, tí gamla orðatakið sigur, at lygnin er høvuðsleys.

Journalisturin sigur sjálvur, at stívasti peikifingur, hann situr á høgru hond á Sandoyar tingmanninum.

Jú, tað sum eg fáið burtur úr, so er hetta tí at eg havi tosað ímóti skrásettum parlag, almennum starvsfólki o.ø.

Hetta høggi í síðu, fer ikki at fáa røddina hjá tingmanninum at tagna. Tvørturímóti, eg ætli at hevja rødd mína við frímóði, tí eg havi ongum forfylgt, heldur ikki teimum samkyndu, og kann eg altíð heilsa teimum pent, og tosað við tey, um tey hava hug.

Men, at fólk av sama kyni fara í parlag er forkastiligt, og er støðan sum í Sodoma og Gomorra, og fari eg ongantíð at atkvøða fyri slíkari lóg, óansæð hvussu tey sum hava hesa áskoðan royna at hjernavaska.

**Visiónstorgið**

Ja, tey bevega seg longur burtur frá okkara Føroya landið. Har løgmaður saman við Landsstýrið umrøða framtíðarætlan og politikk saman við útisetum. Meðan ungi Syðradalsmaðurin hevur tikið hond um róðurpinnin sum løgmaður ella varða-varða. Men ikki tí, tað klárar hann líka væl sum nakar annar.

Meðan tann rætti løgmaðurin liggur í fullari longd og argumenterar fyri teimum samkyndu, sum um tað var tað einasta rætta í hesum landið. Men vit eru nógv í Javnaðarflokkinum sum slettis ikki eru samd við okkara leiðara.

Meðan løgmaður roynur at fáa okkum her heima, at samtykkja soleiðis at § 266b eisini umfatar tey samkyndu.

So er hann eisini í Danmark og tosar um, hvat og hvussu, fyri at fáa hesar vælútbúnu typurnar heimaftur.

Spurningurin ljóðaði: Hvat kann fáa tykkum heim aftur á klettarnar? Ein svaraði ósmæðin, "tá ið bíblian er farin úr Løgtinginum". Tað fór mær kalt niður eftir rygginum, og hugsaði eg hart, slíkum manni hava vit ikki brúk fyri. Um so danskarar hava fylt hann undir angar av fornufti.

Løgmaður, hví læt tú ikki Annitu og Finn eiga málið? Tú tók hetta málið á tínar herðar, og gjørdi teg til talsmann fyri samkynd, sum tær heilagu skriftir hava so greiðan boðskap um.

Mín ávaring til tín skal verða: Lat vera við at gera teg til talsmann fyri slíkt. Løgmaður, samgongan hevur gjørt eitt gott arbeiðið í hesum skeiðnum, ongin ivi um tað. Men tá tað snýr seg um hetta málið, tá vil eg drýpa høvur og siga, at Føroya løgmaður stampar ímóti betri vitan.

Meiningina hjá Anitu á Fríðriksmørk skilji eg ikki væl, hóast hon á løgtingi er eitt vælfungerandi tingfólk, sum ikki stendur aftanfyri nakran á tingið við nógvum skilagóðum uppskotum.

Men tá tað snýr seg um skrásett parlag, ja so má samtykkjast, tí minnilutar skulu verjast.

Men tá tað snýr seg um fosturtøku, tá hevur madamman aðra áskoðan. Mamman ræður yvir sínum kroppi, og skal hon avgera, um barnið skal fjernast úr móðurlívið ella ikki.

Eg farið at enda við einum ørindi úr saginum, sum Edvard Grieg yrkti, og Mikkjal á Ryggi umsetti.

*Vár Gud, sum lívgar fjøll og fjør. O verj tú vára ættarjørð, ver skjøldur vár í frið og stríð, í sorgum sum í fagnartíð.*

# Altjóða limaskapur innan frælsan ítrótt

**HERI ZISKA**



Í Dimmalætting tann 25. oktober vóru tveir spurningar frá Jørgin Evald Solmunde til formannin í sersambandinum fyri frælsan ítrótt (FÍF). Teir tveir spurningarnir vóru:

- Nær kunna vit vanta okkum limaskap innan altjóða sersambandið fyri frælsan ítrótt (IAAF)?
- Hvussu vit kunna luttaka í kapping fyri ung?

Viðvíkjandi altjóða limaskapi er støðan tann, at einans lond kunna gerast limir, og í hesum sambandið er verður eitt land lýst sum "*A self-governing geographical area of the world recognised as an independent state by international law and international governmental bodies.*" Hesar treytir klára Føroyar ikki at liva upp til, og tí kunna vit ikki gerast limir undir núverðandi reglum.

Viðvíkjandi luttøku í kappingum uttanlanda, so eru tað nógvar sokallaðar "opnar kappingar" kring um í heiminum. Hetta eru kappingar, har ein og hvør kann luttakað. Í slíkum kappingum er tað einstaklingurin og ikki landið, sum er umboðað. Vit (FÍF) hava hesi seinnu árini sent nakrar av okkara bestu ungu íðkarum til eina slíka kapping (Världsungdomsspelen) fyri at geva teimum møguleikan fyri at royna seg móti javnlíkum úr øðrum londum. Í løtuni kanna vit, hvørjir aðrir møguleikar eru, ið vit meta okkum hava orku til, og vantandi verða tað fleiri kappingar vit fara til í framtíðini, men vit kunna, sum støðan er í løtuni, ikki senda nakran til HM ella EM at umboða Føroyar.

Eg kundi nevnt, at tað, sum av nógvum verður roknað fyri fjóra stóra altjóða kappingin (eftir OL, HM og økismeistaraheitum so sum EM) innan frælsan ítrótt, er Commonwealth Games. Hetta er kapping fyri fyrrverðandi og núverandi hjálond hja Bretlandi. Tað krevst ikki limaskapur í IAAF, fyri at luttakað í hesari kappingini. Her kann nevnast at vinnarin av hamarkast hjá monnum í Hetlandi (Andy Frost) gjørdist nummar fýra í hesari kappingini í 2006. Hann var einans ½ m frá silvurmerkinum. Hann umboðaðið Isle of Wight. Andy roynur í løtuni at klára krøvini fyri luttøku í HM, men í HM kemur hann at umboðað Stóra Bretland, ið er limur í IAAF, har Isle of Wight ikki er, og heldur ikki kann blíva limur.

# Góðu løgtingslimir og alt Føroya fólk

Spurningurin, um tey samkyndu skulu verða vard av revsilógini er enn einaferð komin inn um tinggáttina, og málið hevur vakt stóran ans í donsku fjølmiðlunum. Tað er heilt greitt, at Føroyar verða skírdar sum eitt trongdskygt samfelag, ið ikki vil kennast við samkynd. Tað kann tykjast ørkymlandi, at tá ið danskir fjølmiðlar endiliga vísa Føroyum ans, snýr tað seg oftast um viðurskifti, sum á ein ella annan hátt seta okkum í eitt minni dámligt ljós. Hesuferð kunnu vit føroyingar í Danmørk tíverri ikki annað enn taka undir við fjølmiðlunum og við ringum tannabiti. Føroyingar fara illa við sínum egnu samkyndu, og tað kunnu vit í MFS-ráðnum (Meginfelag Føroyskra Studenta) ikki longur góðtaka. Føroyska samfelagið má tryggja teimum samkyndu betri umstøður í Føroyum, soleiðis at tey, ið lesa í Føroyum, kunnu verjast av lógini og ikki kenna seg trýstan av landinum. Samstundis skulu samkynd uttanlands kenna seg vælheimafturkomnan eftir loknan lestur.

Tað hevur alstóran skund, at løgtingsfólk taka støðu til at verja allar føroyingar, sum búgva í okkara landi. Vit kunnu ikki góðtaka, at limir okkara, fyrrverandi limir og møguliga komandi limir kunnu verða útsettir fyri tilvitaðum álopum, av ti at landsins myndugleikar ikki meta tað vera neyðugt at verja hendan bólk við lóg. Hendan próvførslan er ikki longur haldgóð. Tað er alneyðugt at verja hendan bólk líka so nógv, sum tað hevur víst seg at vera neyðugt at verja fólksins trúðarlív og húðarlit. Tað er syrgiligt at viðganga; men vit føroyingar hava ikki megnað at latið hjørtu okkara rúmað ein frammanundan sárbæran og útsettan bólk í samfelag okkara.

Í Visjón 2015 verður komið inn á, hvussu vit skulu handfara alheimsgerðina. Vit halda ikki, at politikarar kunnu tosa um at fylgja við og byrgja seg til alheimsgerðina, um teir ikki samstundis eisini vilja tryggja, at eitt modernað demokratiskt samfelag verjir borgaran við lóg. Harumfram stendur skrivað í Viskjón 2015 at: "*fólkið skal trívast, mennast og fjølgast í okkara landi. Hetta skal gerast við at tryggja øllum borgarum neyðugur umstøðar fyri góðum lívskorum í einum vælskipaðum vælferðarsamfelag, har sínámillum ábyrgdin millum borgaran og myndugleikan, eins væl og samhaldsfestið millum øll, verður sett í hásæti.*" Vit hava ilt við at skilja, hvussu ein so samhaldsfastur og menniskaligur arbeiðssetningur kann samsvara við rættarstøðuna hjá teimum samkyndu í Føroyum. Føroyar skulu vera heimsins besta samfelag fyri allar føroyingar og ikki bert teir føroyingar, sum longu hava tað gott í landinum. Tí skulu tey sjálvsagdu grundleggjandi rættindini hjá minnilutum í samfelagnum eisini tryggjast. Tað er syrgiligt at viðganga, at ein av orsøkunum til at føroysk lesandi kunnu ivast í at koma heim aftur til Føroyar møguliga er, at tey ikki meta seg hóska inn í tað føroyska samfelagið ella verða góðtiknan av øðrum føroyingunum. Tit tingfólk tosa um at útbúgva fólkið, senda tey um allan heim at nema sær útbúgving og gera tað lokkandi hjá teimum at koma heim aftur á klettarnar. Skal hetta eydnast, og er hetta av røttum visjónin hjá sitandi landsstýri, er tað ein treyt, at grundleggjandi rættartrygdin er í lagi. Allir føroyingar mugu hætta sær og føla tað lokkandi at koma aftur til oyggjarnar. Eisini tey, sum ikki hóska inn í tær "normalu og etisku" allýsingarnar av, hvat meirilutin í Føroyum metir vera ein "virðiligan" føroying.

Vit í MFS-ráðnum vita at hendan lóg er sera torfør hjá tykkum tingfólkum at taka støðu til. Vit vilja tó inniliga heita á tykkum um at gera tykkara til, at hon eisini kemur at fevna um kynsliga orientering. Hetta er ein stór avgerð at taka; men hon er virðilig og menniskjalig. Tit verða ikki biðin um, at játta skrásett parlag ella at noyða Fólkakirkjuna at gifta samkynd. Avleiðingarnar av hesari avgerð verða, at ein føroyskur minniluti, sum hevur tað svárt í samfelag okkara, fær rættin til eisini at verða vardur av lógini. Vit skylda at geva teimum samkyndu sama møguleika, sum vit geva øllum øðrum føroyingum, til at fáa eitt gott og virðiligt lív. Vit skylda øllum føroyingum, sum skulu bera landið víðari, at geva teimum góð kor. Vit skylda føroysku tjóðini, at standa saman sum eitt fólk, samstundis sum vit geva rásarúm fyri hvørjum øðrum. Vit heita tí eisini á alt Føroya fólk um at stuðla tingfólkinum í at taka hesa avgerð, sjálvt um tit ikki eru samd í teirri leið, sum samkynd hava valt at ganga.

Keypmannahavn tann 27. oktober 2006.

Vinarliga vegna MFS-ráðið:

**Doris Bjarkhamar**
**Jóhan Pauli Helgason**
**Durita Jóansdóttir**
**Fía Lindenskov**
**Malan Ludvig**
**Jákup Emil Hansen**
**Súsanna Niclasen**
**Anna Rein**